## Rodmund Bondansson

1. Ólavur kongur í Noregi, letur útrusta skip,
ætlar burtur í onnur lond at elva góðan grip.

***Niðurlag:***
*Takið saman handatak, tað kemur eitt rumbul í drekansa tak,*
*Tað er alt við knagan og við brakan. Takið saman handatak.*

2. Gongur hann til strandar oman, við sínum monnum hundrað,
og hann Rodmund Bondansson, ið snekkjuni stýra kundi.

3. Vindur hann upp sítt silkisegl, gull við vovin rand.
Strikar ikki á bunka niður fyrrenn við Ísland.

4. Kongurin talar til sínar menn, alt fyri uttan neyð,
tit skulu tykkum í landið upp at røva neyt og seyð.

5. Fóru teir í landið upp alt fyri uttan neyð,
drivu oman at strondini bæði neyt og seyð.

6. Tóku bæði neyt og seyð oman til strandar leita,
har kom ein so gamal maður Gubbin mundi hann eita.

7. Tað var hesin gamali maður, svør á sína trú,
Tit hava tikið tær geitir tvær, eg átti mær í bú.

8. Eg haldi tað einki roysni vera, at røva ein gamlan kall,
heldur tikið drekan tann, sum liggur for Ervarfjall.

9. Eg haldi tað einki roysni vera, at røva neyt og seyð,
heldur tikið drekan tann, sum liggur for Ervarheygg.

10. Svaraði Rodmund Bondansson, gerst so nýtin at fregnast,
hoyr tú tað tú gamali maður, hvussu skal drekin nevnast.

11. Svaraði hesin gamali maður, í frið seg hevði stillað,
í forum bar hann navnið tað, teir kalla hann Ásmund illa.

12. Tá hann var at elli komin, og ikki mentur at stríða,
gróv hann seg í heyggin tann, sum gitin man vera víða.

13. Siglur tú tær suður við land og kemur til næstu havn,
so sær tú sjálvan Ervarheyggj beint fyri framman stavn.

14. Har skal tú biðja tínar menn, goyma tykkar skip,
meðan tú gongur í landið upp at elva góðan grip.

15. Hoyr tú tað tú gamli maður, ein gullring gevi eg tær,
tak tú bæði neyt og seyð í friði heim við tær.

16. So silgdi Rodmund suður við land og kom til næstu havn,
tá sá hann sjálvan Ervarheyggj, beint fyri framman stavn.

17. Her skulu tit liggja mínir menn og goyma okkar skip,
meðan eg gangi í landið upp at elva góðan grip.

18. Grevur hann í dagar, grevur hann í tvá,
inntil tann hin triðja, tá mundi hann drekan sjá.

19. Rodnund tekur gull og silvur bindur saman í byrðu.
Drekin situr í sínum sessi, so lítið hann tað hirðir.

20. Hugsaði Rodmund Bondansson gerst so nýtin drongur,
hevði eg fingið tað góða svørð, við drekans høvður hongur.

21. Rodmund gjørdi so stórt eitt lop yvir drekans stól,
fekk so fatur á svørðinum, tað skein sum middagssól.

22. Mælti tað Rodmund Bondansson heldur á dýrum gripi,
hvussu skal eg svørðið nevna, ið eg havi tikið.

23. Gislatonn tú nevna skal handan brandin bjarta,
tað hevur so manga kristna kempu skorðið av um hjarta.

24. Svaraði hesin grimi dreki, niður i orni rakar,
tú tekur burt mítt gull og fæ, hvat havi eg gjørt til sakar.

25. Hoyr tú tað tú grimi dreki, hvat er tær komi til eygar.
Eg taki burt títt gull og fæ og so tínar ringar reyðar.

26. Svaraði hesin grimi dreki, frá man frættast víða,
tú hevur tikið mítt góða svørð, eg kann ei mót tær stríða.

27. Svaraði Rodmund Bondansson, ikki var góður at lasta,
vit skulu taka hondum saman, og eg skal svørðið kasta.

26. Síðani tóku teir hondum saman, tað var mikið dundur,
so er mær av sonnum sagt, at drekin hann kom undir.

28. Setir hann kløvur í Rodmunds nakka ilsku mundi tað gera,
reiv hann av honum kjøt og hár, niður millum herðar.

29. Svaraði Rodmund Bondansson, lítur á hendur stórar,
plagar at vera kettu líkt at liggja undir og klóra.

30. Rodmund knýtti harðan neva bæði av ilsku og sút,
ripaði hann í drekans høvður, so heilin hann fleyg út.

30. Tekur hann bæði gull og silvur ber tað niður til skip,
Rodmund hoyrdi tað mesta til, hann elvdi góðan grip.

31. Tekur hann bæði gull og silvur niður til strandar ber,
Ólavur kongur ríkur bleiv av hesi víkingsferð.